

*Baptistapresturin og fyrrverandi guvernørurin Mike Huckabee vinnur eftir øllum at døma uppstillingarvalið hjá republikanarunum í Iowa*



*Barrack Obama hevur fingið hjálp frá Oprah Winfrey til valstríðið. Her fær Mike Huckabee hjálp frá filmsleikaranum Chuck Norris og konu hansara Gene*

# Iowa – tann fyrsta royndin

**Í dag fáa amerikanararnir ta fyrstu ábendingina um, hvussu teirra næsti forseti fer at eita**

Tann 4. novembur skulu amerikanararnir velja nýggjan forseta, og í kvøld ella í nátt fáa teir kanska ta fyrstu ábendingina um, hvussu hann - ella kanska hon - fer at eita. Í dag er uppstillingarval í Iowa, og longu um fimm dagar verður val í New Hampshire.

Amerikanskir eygleiðarar og valserfrøðingar eru samdir um, at hesaferð er tað serliga torført at meta um, hvør verður valevni í heyst. Ein meiningakanning hjá Pew Research Centre í gjár vísti, at teir republikonsku veljararnir vilja hava senatorin John McCain, men at hann er í sera harðari kapping við fyrrverandi New York-borgarstjóran, Rudolph Giuliani, og baptistaprestin Mike Huckabee.

### Huckabee og Obama

Í Iowa er tó lítil ivi um, at Mike Huckabee fer við teimum flestu republikonsku atkvøðunum í dag. Hann er sera væl umtóktur ímillum tey sokallaðu "víðgongdu kristnu" og fær eftir kanningunum umleið 32 prosent av teimum republikonsku atkvøðunum. Mormonarin Mitt Romney lá annars leingi á odda í Iowa, men fær nú 26 prosent.

Á veljarafundi í býnum Sergeant Bluff heitti Mike Huckabee á fólk um at brúka allar snildir fyri at hjálpa sær at vinna valið í Iowa og forsetavalið í heyst.

- Tit skulu rudda mær vegin til Hvítu Húsini. Tit skulu ikki fara einsamøll á val. Fyllið bilin við fólki. Ella ein vøruvogn. Takið kirkjubussin og fyllið hann við fólki og koyrið tey á valstøðini at atkvøða fyri mær, segði Huckabee.

Hjá demokratunum er hørð kapping í Iowa. Teir seinastu dagarnar hava kanningar bent á, at Barrack Obama fór at vinna rættiliga trygt við umleið 32 prosentum, meðan Hillary Clinton og John Edwards sóu út til at fáa umleið 25 prosent í part. Men eru tær seinastu kanningarnar eftirfarandi, er munurin tódnaður.

# Hann lovar at broyta USA men er tað nóg mikið?

**Kanningar vísa, at nógvir amerikanskir veljarar vilja hava eina broyting - eina nýggja kós, og tað kann koma demokratinum Barrack Obama væl við í Iowa í dag**

Sum tann fyrsti av teimum 50 amerikonsku statunum hevur Iowa uppstillingarval í dag. Tær seinastu vikurnar hava valevni hjá báðum flokkum ferðast aftur og fram og hildið eitt ótal av veljarafundum, har tey hava roynt at sannføra Iowa-veljararnar um, hvat teir skulu gera seinni í dag.

Ímeðan hava valserfrøðingar kannað, hvat kann avgera valið í Iowa og í hinum statunum, og teir flestu er á einum máli um, at spurningurin um eina nýggja kós hevur stóran týdning hjá báðum flokkum. Í heyst vísti ein kanning, at 46 prosent av teimum spurdu vildu hava eina nýggja kós í amerikonskum politikki, og ein kanning gamlaárskvøld segði tað sama.

### Nýtt og gott gamalt

Washington Post heldur, at kravið um eina nýggja kós kann vera ein fyrimunur fyri Barrack Obama í kappingini við Hillary Clinton í uppstillingini hjá demokratunum. Obama hevur lýst seg sjálvan sum nakað nýtt, meðan Hillary hinvegin hevur víst á, at royndir hava størri týdning.

– Obama hevur skilt, hvat veljararnir vilja hava, og hann hevur fingið ta bestu byrjanina upp á uppstillingina, sigur valserfrøðingurin Peter D. Hart við Washington Post.



*Barrack Obama umboðar tað nýggja og ta nýggju kósina*



*Hillary Clinton umboðar tær politisku royndirnar*

Fyri nøkrum døgum síðani bendi alt á, at Barrack Obama fór at vinna í Iowa. Tá góvu kanningarnar honum 32 prosent av atkvøðunum, meðan Hillary Clinton og Johyn Edwards lógu á ávikavist 25 og 24 prosentum. Nú er munurin tódnaður, og sambært Reuters gav tann seinasta kanningin Obama og Clinton 28 prosent í part og Edwards 26 prosent.

### Umráðandi val

Valevni, sum standa seg illa í teimum fyrstu statunum, plaga vanliga at taka seg burtur úr kappingini, og tí er valið í Iowa í dag sera týdningarmikið hjá øllum valevnunum.

- Tað næsta valið er longu í næstu viku, og tí hevur einki av valevnunum ráð til at snáva í dag, sigur Dante Scala, professari í statsvísindi á lærda háskúlanum í New Hampshire, við NTB. Hann sigur, at tað er umráðandi hjá tí einstaka valevninum at vera á varðhaldi, tí annars kann valið vera avgjørt, áðrenn ein varnast tað.

Í næstu viku skulu valevnini dystast í New Hampshire, og søgan hevur víst, at tað valið er sera týdningarmikið. Frá 1952 til 1992 eydnaðist tað ongum valevni at vinna frosetavalið uttan at vinna í New Hampshire fyrst. Bill Clinton gjørdist undantakið.